**inni** - trygt og ómaksleyst til hús



### Summarhús - Dungagøta 5, 470 Eiði
Húsini eru í 2 hæddum, herumframt er úthús og hjallur - samlað búvídd 40 fermetrar. Grundøkið er 56 fermetrar. Byggiár: 1930- unum. Húsini eru umvæld tey seinastu árini, m.a. eru vindeyguni og gólvini skift, brúsirúmið er nýgjørt og oljufýringin er nýggj. Í niðaru hæddini er wc, køkur/- stova. Í ovaru hæddini er úti á lofti, hjúnarúm og kamar. Í úthúsinum er brúsirúm/- vaskirúm/- fýrrúm. Húsini standa niðarliga í bygdini í friðarligum umhvørvi. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



### Sethús - Neystarvegur 7, 435 Streymnes
Húsini eru í 3 hæddum - samlað búvídd er 134 fermetrar. Grundøkið er uml. 280 fermetrar. Byggiár: uml 1900. Húsini eru viðlíkahildin og umvæld hesu seinastu nógvu árini. Húsini eru sera hugnalig, tey gomlu plankagólvini eru niðurpussað, innveggirnir og undirsløgini eru málað við ljósum litum, sum gevur ein hugnaligan dám. Í miðhæddini er durur, gongd, køkur, bryggers, stova og baðirúm. Í ovastu hæddini er úti á loft og 2 kømur. Í niðastu hæddini er kjallararúm/-fýr/-vaskirúm. Húsini standa tætt við vegin og hava sera gott og frítt útsýni yvir bygdina. Sunnanfyri húsini er urtagarður við hugnaligum sólkróki. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



### Sethús - Brekkuskákið 4, Klaksvík
Húsini eru í 2 hæddum - hvør hæddin er góðar 130 fermetrar, samlað búvídd er góðar 260 fermetrar. Grundøkið er 451 fermetrar. Byggiár: 1949. Húsini eru stoypt og klødd við alminiumplátum, takið er úr tjørupappi og varð skift í 2003. Í erva er durur, gongd, køkur, 2 stovur, 3 kømur, baðirúm og hjúnarúm. Í neðra er kjallararúm/- fýr/- vaskirúm og eitt goymslurúm. Í íbúðini, sum er í neðra, er durur, køkur/- stova, gongd, kamar, baðirúm og hjúnarúm. Húsini standa mitt í býnum og hava sera gott útsýni. Garður er runt húsini. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

### Jørð í Norðdepli til sølu
4. gl – 15 sk. Talan er um matr. 128a í Norðaraparti til sølu um hóskandi boð fæst.

Sosialurin 341800

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

**inni**

W W W . S O S I A L U R I N . F O



Ung í arbeiði

# Tilmelding

Kommunan fer undir verkætlanina „Ung í Arbeiði" í viku 26, 27, 28 og 29. Tað er tíðarskeiðið frá 25. juni til 20. juli.

Tilboðið hjá Tórshavnar kommunu er galdandi fyri ungdómar í aldrinum 14 til 17 ár. Tey sleppa til arbeiðis í tvær vikur hvør. Arbeiðstíðin verður átta tímar dagliga, fimm dagar um vikuna. Møtt verður klokkan 8.00 á morgni, og klokkan 16.00 seinnapartin er arbeiðsdagurin liðugur. Lønin er tann sáttmálaavtalaða tímalønin umframt frítíðarløn.

**Tilmelding**
Hósdagin 21. juni ber til hjá ungdómum í aldrinum frá 14 til 17 ár, at melda seg til 'Ung í Arbeiði' . Tilmelding frá klokkan 10.00 á telefon 302013.

**Meira fæst at vita**
um verkætlanina við at venda sær til Boða Haraldsson, býarverkfrøðing, Tóra í Hoyvík, býargartnara, ella Janus Isfeldt, lønarfultrúa, á telefon 302010.

**Tórshavnar kommuna**